Olivia W. Hansen

# Sálmar
## - til fólkaskúlan

## Læraravegleiðing

Olivia W. Hansen

# Sálmar til fólkaskúlan

## *- læraravegleiðing*

Føroya Skúlabókagrunnur 2008

Olivia W. Hansen
Sálmar til fólkaskúlan, læraravegleiðing
©Føroya Skúlabókagrunnur 2008
Útgáva: Føroya Skúlabókagrunnur, Tórshavn 2008
ISBN 978-99918-0-963-2

Innihaldsyvirlit

**Inngangur** ..... **7**
Um tilfarið ..... 7
**Greiningarfrymilin** ..... **8**
Miðdeild ..... 8
Framhaldsdeild ..... 10
**Inngangur, uppgávur og eykauppgávur** ..... **12**
**Sálmabók Føroya Kirkju** ..... **12**
Sálmar til fólkaskúlan, Miðdeild ..... 12
Sálmar til fólkaskúlan, Framhaldsdeild ..... 13
**Hvat er ein sálmur?** ..... **14**
**Ymisk sløg av sálmum** ..... **15**
**Sálmar og bíbilskar vísur** ..... **15**
**Um sálmaskaldini** ..... **15**
**Arbeiðshættir** ..... **16**
Floksundirvísing ..... 16
Bólkaarbeiði ..... 16
Drama ..... 17
Evnisarbeiði - tematiskt arbeiði ..... 17
Myndamál og myndlist ..... 17
**Sálmasløgini** ..... **17**
Lívsrytman ..... 18
Hátíðir ..... 18
Bíbilskir sálmar ..... 18
**Keldur:** ..... **19**

# Læraravegleiðingin

## Inngangur

Eftir áheitan frá Føroya Skúlabókagrunni, er hetta tilfarið gjørt at nýta, tá ið arbeitt verður við sálmum. Ætlanin við **Sálmar til fólkaskúlan** er at rætta lærarum eina hjálpandi hond, tá ið sálmar verða viðgjørdir og at stuðla upp undir sálmasangin í skúlanum. Tað verður mangan fört fram, at sálmasongurin er um at hvørva úr fólkaskúlanum, og at lærarar aftra seg at fara undir hetta undirvísingarevni, tí einki tilfar er, ella tí at teir ikki hætta sær at syngja fyri ella duga ikki at leika nakað ljóðføri. Her eru nøkur hugskot til arbeiðsuppgávur til sálmarnar. Tíverri eri eg ikki før fyri at gera nakað á tí tónleikaliga økinum, og av teirri orsøk eru sálmaløgini ikki viðgjørd, men eg havi tó tikið nakrar fáa spurningar um løgini við í greiningarfrymilin, tí tey hoyra heima har. Mín vón er, at Skúlabókagrunnurin tekur táttin upp og fær bøtt um hetta.

## Um tilfarið

Tilfarið er sett saman av tveimum næmingaheftum á ymiskum torleikastigi og einari læraravegleiðing.

**Sálmar til fólkaskúlan**, **Miðdeild**, er ætlað næmingum í 4. til 7. flokki. Lærarin verður tó í fleiri førum noyddur at hjálpa til. Sálmar eru torskildir og sjáldan á barnannna støði, hvørki málsliga ella innihaldsliga. Vit noyðast tí at hava ein virknan leiklut, og í summum førum verða vit noydd at lúka burturúr ella gera einfaldar uppgávur, alt eftir næminganna støði.

**Sálmar til fólkaskúlan**, **Framhaldsdeild**, er ætlað næmingum í 8. til 10. flokki. Her eru uppgávurnar torførari, men eisini her stendur tað til læraran at meta um, hvat næmingarnir eru førir fyri. Tilfarið kann eisini í stóran mun nýtast tvørgreinaligt. Her eru m.a. uppgávur í at samanbera sálmar, tekst og týðingar.

**Greiningarfrymilin**

Í næmingabókini er ein greiningarfrymil[1] (ein til tey yngru og ein eitt sindur drúgvari til tey eldru). Tað kann tykjast eitt sindur rúgvismikið, um greiningarfrymilin skal takast út í æsir hvørja ferð. Tó eiga vit at gera hetta av og á, so at næmingarnir læra grundleggjandi sálmagreining. Veljast kann ímillum at nýta allan frymilin, at nýta hann lutvíst ella at fara beinleiðis til uppskotini til arbeiðsuppgávur. Verður seinasti nevndi arbeiðsháttur nýttur, so er alneyðugt at tryggja sær, at næmingarnir kenna innihaldið og boðskapin í sálminum frammanundan, tí arbeiðsuppgávurnar eru at meta sum eykauppgávur, sum taka støði í, at næmingarnir hava arbeitt við innihaldinum.

**Miðdeild**

1. **Les sálmin fleiri ferðir.**
2. **Slá torfør orð upp í orðabókini**.
3. **Hvussu eitur sálmurin?** Sálmar hava ikki heiti sum aðrar yrkingar. Tí siga vit, at sálmurin eitur sum fyrsta regla í fyrsta ørindi.
4. **Nær er sálmurin yrktur?** Tað er ikki altíð, at vit kunnu fáa at vita, nær ein sálmur er yrktur. Fleiri sálmar eru eisini broyttir nógvar ferðir ígjøgnum tíðirnar.
5. **Hvør hevur yrkt sálmin?** Her verður meint við, hvør hevur yrkt hesa útgávuna av sálminum, sum vit arbeiða við.
6. **Er talan um ein upprunasálm?** Er sálmurin av fyrstan tíð yrktur á føroyskum? Tað kom eisini fyri, at føroyskar kvinnur og menn yrktu á donskum, og síðani er sálmurin týddur.
7. **Er talan um týddan ella umyrktan sálm, hvør er týðarin ella yrkjarin?**
8. **Hvør hevur gjørt lagið?** Í summum førum vita vit als ikki, hvør hevur gjørt lagið, eitt nú um talan er um eitt gamalt fólkalag ella gamalt føroyskt sálmalag. Tá vita vit einans hvør hevur skrivað lagið niður, men ikki hvør hevur gjørt tað.
9. **Nær er lagið gjørt?** Tað er ikki altíð, at vit vita, nær lagið er gjørt.
10. **Kunnu fleiri løg nýtast til sálmin, um ja hvørji**?

[1] Frymilin er partvíst gjørdur eftir: Dahl, Árni, o. a.: **Ung orð**, Føroya Skúlabókagrunnur 1984 og eftir: Rydahl, John, m.f.: **Lærervejledning til Salmer i centrum**, Nyt Nordisk Forlag Arnold Busck 1999

11. **Hvat snýr sálmurin seg um?**

Skriva ein stuttan samandrátt av sálminum ella tíggju lyklaorð í sálminum.

12. **Skriva nøkur fá orð um, hvat kemur tær í huga, tá ið tú lesur ella syngur sálmin?**

13. **Í hvønn mun er samsvar millum heitið á sálminum (fyrstu reglu í sálminum) og innihaldið?**

14. **Hvat ella hvørji ørindi hava mest týdning í sálminum?**

15. **Hvat slag av sálmi er hetta?**

    a) **Ein bíbilskur sálmur,**er yrktur yvir ein ávísan tekst í Bíbliuni, greiðir frá einari ávísari hending í GT ella NT, er ein bíbliusøga, sum kann syngjast, ella er sum ein prædika yvir ávíst stað í Bíbliuni.

    b) **Ein sálmur, sum lýsir eitt ávíst huglag,** hevur einki beinleiðis við Bíbliuna at gera, men lýsir kristnilívið sum heild. Sálmurin lýsir menniskja og náttúruna. Sálmurin lýsir eitt huglag, t.d. sólina, sum rísur, gróðurin á markini, lívið sum heild, sorg og gleði o.s.fr.

    c) **Ein hátíðarsálmur** er skrivaður til eina hátíð t.d. jól, páskir ella hvítusunnu.

    d) **Ein sálmur til eitt ávíst høvi – ein tilburðarsálmur** er yrktur til ein ávísan tilburð, so sum barnadóp, brúðarvígslu, gravarferð, kirkjuvígslu ella ólavsøku.

    e) **Finnur tú fleiri av nevndu eyðkennunum í sálminum**? Fleiri sálmar eru ein blandingur. Ein hátíðarsálmur kann eisini vera ein bíbilskur sálmur.

16. **Hvørji rím eru í sálminum**?

17. **Kann sálmurin býtast í partar?**

18. **Hvussu dámar tær sálmin? Grunda svarið.**

**Framhaldsdeild**

1. **Les sálmin fleiri ferðir**.
2. **Slá torfør orð upp í orðabókini**.
3. **Hvussu eitur sálmurin?** Sálmar hava ikki heiti sum aðrar yrkingar. Tí siga vit, at sálmurin eitur sum fyrsta regla í fyrsta ørindi.
4. **Nær er sálmurin yrktur?** Tað er ikki altíð, at vit kunnu fáa uppspurt, nær ein sálmur er yrktur. Fleiri sálmar eru eisini broyttir nógvar ferðir ígjøgnum tíðirnar.
5. **Hvør hevur yrkt sálmin?** Her verður meint við, hvør hevur yrkt hesa útgávuna av sálminum, sum vit arbeiða við.
6. **Er talan um ein upprunasálm?** Er sálmurin av fyrstan tíð yrktur á føroyskum? Tað kom eisini fyri, at føroyskar kvinnur og menn yrktu á donskum, og síðani er sálmurin týddur.
7. **Er talan um týddan ella umyrktan sálm, hvør er týðarin ella yrkjarin?**
8. **Hvør hevur gjørt lagið?** Í summum førum vita vit als ikki, hvør hevur gjørt lagið, eitt nú um talan er um eitt gamalt fólkalag ella gamalt føroyskt sálmalag. Tá vita vit einans, hvør hevur skrivað lagið niður, men ikki hvør hevur gjørt tað.
9. **Nær er lagið gjørt?** Tað er ikki altíð, at vit vita, nær lagið er gjørt.
10. **Kunnu fleiri løg nýtast til sálmin, um ja hvørji?**
11. **Hvat snýr sálmurin seg um?**
    Skriva ein stuttan samandrátt av sálminum ella tíggju lyklaorð í sálminum.
12. **Skriva nøkur fá orð um, hvat kemur tær í huga, tá ið tú lesur ella syngur sálmin.** Á donskum eitur hetta “meddigtning“, ”at yrkja við”. Tá ið vit lesa ein tekst, setur hann altíð gongd í tankar, hugflog og kenslur, soleiðis at vit yrkja víðari og halda fram við tekstinum. Eisini kemur tað fyri, at tankarnir fara at reika og festa seg við okkurt heilt annað, m.a. tí at teksturin talar um nakrar kenslur, og tær kenna vit, men i heilt øðrum samanhangi.

13. **Í hvønn mun er samsvar millum heitið á sálminum (fyrstu reglu í sálminum) og innihaldið, og hvussu hóskar heitið á sálminum saman við kjarnanum í sálminum?**
14. **Hvat ella hvørji ørindi hava mest týdning í sálminum?**
15. **Hvat slag av sálmi er hetta?**
    a) **Ein bíbilskur sálmur,** er yrktur yvir ein ávísan tekst í Bíbliuni, greiðir frá einari ávísari hending í GT ella NT, er ein bíbliusøga, sum kann syngjast, ella er sum ein prædika yvir ávíst stað í Bíbliuni
    b) **Ein sálmur, sum lýsir eitt ávíst huglag,** hevur einki beinleiðis við Bíbliuna at gera, men lýsir kristnilívið sum heild. Sálmurin lýsir menniskja og náttúruna. Sálmurin lýsir eitt huglag, t.d. sólina, sum rísur, gróðurin á markini, lívið sum heild, sorg og gleði o.s.fr.
    c) **Ein hátíðarsálmur** er skrivaður til eina hátíð t.d. jól, páskir ella hvítusunnu.
    d) **Ein sálmur til eitt ávíst høvi – ein tilburðarsálmur** er yrktur til ein ávísan tilburð, so sum barnadóp, brúðarvígslu, gravarferð, kirkjuvígslu ella ólavsøku.
    e) **Finnur tú fleiri av nevndu eyðkennunum í sálminum**? Fleiri sálmar eru ein blandingur. Ein hátíðarsálmur kann eisini vera ein bíbilskur sálmur.
16. **Hvørji rím eru í sálminum**?

    **Endarím (parrím, krossrím og umgyrd rím), bókstavarím, ljóðrím?**

    Næmingarnir kunnu eisini royna at finna orð, sum hóska og ljóða væl saman og kanna, um rím og ljómlag hava týdning fyri upplivingina av sálminum.
17. **Hvørjar skaldsligar myndir finnur tú í sálminum?**

    **Myndatalu (metafor), samanberingar, symbol - ímyndir?**
18. **Kann sálmurin býtast í partar?** t.d. fer sálmurin fram á sama stað alla tíðina ella verður skift millum fleiri støð? Eru skifti í sálminum?
19. **Hvussu dámar tær sálmin? Grunda svarið.**

**Inngangur, uppgávur og eykauppgávur**

Í næmingaheftinum er skrivaður ein inngangur til hvønn sálmin, áðrenn uppgávurnar koma, t.d. um upprunan hjá sálminum, um sálmaslagið, yrkingarháttin, innihaldið ella týðingina. Tað er sera torført at finna nakað serligt um teir føroysku sálmarnar. Tað finst einki samlað yvirlit ella ein samlað vísindalig gjøgnumgongd av sálmunum í Sálmabókini, og tí gerst tað eitt sindur avmarkað, hvat eg havi fingið hendur á um teir sálmarnar, sum eru føroyskir av uppruna.[2] Øðrvísi er við teimum sálmunum, sum eisini standa í tí donsku sálmabókini, tí har er lættari at finna tilfar[3].

Síðani koma *Uppgávur* og við hvørt *Aðrar uppgávur*. Meðan uppgávurnar hava beinleiðis tilknýti til sálmin ella okkurt, sum sálmurin viðger, so verður tað í *Øðrum uppgávum* farið víðari. Har er meiningin at arbeiða meira frítt út frá evninum, og nógvar av teimum uppgávunum hóska eisini væl sum bólkaarbeiði og tvørgreinaligt arbeiði. Í nøkrum uppgávum kemur myndagreining fyri. Eg havi tó ikki sett nakran frymil til myndagreining í tilfarið, men frymil til myndagreining er at finna m.a. í næmingabókini til Káin og Ábel.[4]

**Sálmabók Føroya Kirkju**

**Sálmar til fólkaskúlan, Miðdeild** byrjar við Sálmabókini. Ætlanin við hesum tekstinum og uppgávunum er at læra næmingarnar at nýta sálmabókina, greiða frá, hvussu hon er skipað, og at geva teimum innlit í, hvat stendur í sálmabókini.

Uppgávurnar til hendan partin eru á einum slíkum støði, at eg meti, at næmingar frá 4.-5. flokki kunnu nýta tær. Meðan arbeitt verður við hesum partinum, er neyðugt, at næmingarnir hava eina sálmabók, sum teir kunnu sláa upp í. Eg havi harafturat valt at nevna eitt sindur um kirkjuárið í sambandi við sálmarnar. Viðvíkjandi kirkjuárinum er at siga, at har eru ikki allir halgidagar nevndir. Tað er eisini hugsandi, at nakrir næmingar eisini vita um nýggjar halgidagar/minningardagar t.d. um tey, sum eru deyð í ferðsluni og tey, ið doyðu sum pinkubørn.

---

[2] Her havi m.a. nýtt: **Tilfarið sum hevur verið nýtt í Útvarpi Føroya** og er tøkt á Føroya Landsbókasavni, og **greinastubbar** úr ymsum bløðum og tíðarritum

[3] Malling, Andreas: **Dansk salmehistorie bind I-V**, J. H. Schultz Forlag 1962-1966
Dahn, Helge: **Salmehåndbogen, en gennemgang af den danske salmebog**, Nyt Nordisk forlag Arnold Busck, 1984

[4] Matras, Karolina: **Káin og Ábel – Næmingabók**, Føroya Skúlabógabrunnur 2003

Sálmabókin er skipað eftir trúarorðunum, men sálmabókin og kirkjan og kirkjuárið hanga óloysiliga saman. Mær hevur ikki eydnast at fáa fatur á føroyskum tilfari um kirkjuárið o.a. Hava lærarar hug at arbeiða víðari við evninum, er nógv at finna á ymsum heimasíðum hjá kirkjum. Eg havi í høvuðsheitum styðjað meg til heimasíðuna hjá tí donsku fólkakirkjuni[5]. Leggjast kann afturat, at á heimasíðuni hjá Føroya Stiftsstjórn eru bæði Bíblian og Sálmabókin teldutøkar.[6]

**Sálmar til fólkaskúlan, Framhaldsdeild**

Byrjar við einari allýsing (definitión) av sálmahugtakinum og einari gjøgnumgongd av sálmagreinum (genre). Tað eru nógvar meiningar um júst hesi fyribrigdi, men eg nýti eina rættuliga einfalda bólking av sálmunum og sálmagreinunum[7], so at næmingarnir fáa eitt amboð, sum teir kunnu nýta uttan alt ov nógv hóvasták. Eg komi eisini í stuttum inn á tær bíbilsku vísurnar, tí tær hava verið nógv nýttar í Føroyum fyrr og eru sostatt ein partur av okkara mentanararvi.

Av tí at allýsingin av sálmahugtakinum ikki stendur í bókini til tey yngru, so seti eg hana eisini her.

**Sálmar (ein allýsing)**

Orðið sálmur kemur av grikska orðinum psalmos og merkir sangur til streingjaleik. Upprunaliga var orðið sálmar einans nýtt um sálmarnar í Gamla Testamenti. Hesir sálmarnir vóru knýttir at gudsdýrkanini í templinum hjá ísraelum í Jerúsalem.

Í Nýggja Testamenti finnast nógv dømi um, at tey fyrstu kristnu kirkjuliðini hildu fast við sálmarnar, serliga Dávids sálmar, og bæði Jesus (Matt. 22,44) og Paulus (Róm. 3,10) endurgeva úr sálmunum.

---

[5] www.folkekirken.dk
[6] www.folkakirkjan.fo
[7] Eg havi nýtt Rydahl, John, m.f.: **Lærervejledning til Salmer i centrum**, Nyt Nordisk Forlag Arnold Busck 1999
Folkekirkens Skoletjeneste i Haderslev**: På salmenes tonestige**, http://home3.inet.tele.dk/agerbo/m.html
Jensen, Th. Borup / Bugge, K. E. red.: **Salmen som lovsang og litteratur I og II**, Religionspædagogiske Studier /Gyldendal 1972

Gjøgnum alla miðøldina varðveita sálmarnir úr Gamla Testamenti sína serstøðu, ikki minst tí at teir verða nýttir sum ein liður í tíðarsanginum (tidesang) í kleystrunum og sum partur av tí katólsku messuni.

Eisini trúbótarmenninir styðjaðu seg nógv til tann gamla sangsiðin, og sálmarnir úr Gamla Testamenti gjørdust fyrimynd fyri nýggja sálmayrking.

Luther helt ikki so fast um tann gamla sangsiðin. Hann vildi hava meira frælsi. Tað, ið um galt, var at raka meiningina í tí halgu skriftini, og tí skuldi frælsi ráða viðvíkjandi orðavalinum. Luther vildi, at Guðs orð skuldi ljóða og virka í fólkinum sum ein livandi rødd í samtíðar málbúna. Tí fór Luther undir at umyrkja og týða latínskar sálmar til móðurmálið, og harafturat yrkti hann eisini sálmar. Luther vildi hava fólkið við í gudstænastuni, og tí skuldu tey eisini syngja við. Í teirri katólsku kirkjuni luttók leikfólkið ikki í sálmasanginum, men eitt kór stóð fyri sanginum.

**Hvat er ein sálmur?**

Sálmar eru nýtsluyrkingar og ein serligur bólkur av sangum, ið eru skrivaðir til nýtslu í kristnu gudstænastuni, øðrum kirkjuligum høpi (handlingum) og persónligari andakt.

Eins og tað er galdandi fyri aðrar nýtsluyrkingar t.d. fosturlandssangin skulu sálmarnir lúka ávís krøv um form og innihald fyri at kunna kallast sálmur.

1. **Fyrsta treytin er ein uttanveltað støða (objektivitetur).** Tað, sálmurin sigur, skal hava alment gildi, ikki einans fyri skaldið, men fyri alla meinigheitina. Sálmurin er játtandi, og gjøgnum sálmin sigur meinigheitini frá sínum kenslum t.d. við lovsongi og bøn um hjálp og verður við hesum styrkt í felagsskapinum og trúnni.

2. **Sálmurin skal hava ein boðskap, sum er tikin úr einum felags fatanarumhvørvi (forståelsesramme) t.d. úr Bíbliuni, bíbilskum frásagnum ella alment kristnum royndum og kenslum**. Nógvir sálmar eru skrivaðir til ávísar kirkjuligar hátíðir so sum jól, páskir og hvítusunnu ella til ávísar liðir í gudstænastuni so sum trúarjáttanina og altargongdina.

3. **Sálmurin skal vera sangbærur (góður at syngja).** Sálmarnir eru yrktir til at verða sungnir í kirkju ella samkomu, tessvegna hevur sálmurin reglulig ørindi, eina fasta rútmu (stev) og sum oftast endarím.

Men tað sum ger sálmin til sálm – góðkennir (autoriserar) hann – er, at kirkjuliðið ella samkoman tekur sálmin til sín og nýtir hann í gudstænastuni. Hvørt einstakt kirkjulið kann ikki gera sær sína egnu sálmabók. Hetta verður so loyst á tann hátt, at teir kirkjuligu myndugleikarnir seta eina nevnd, sum fær til uppgávu at gera eina sálmabók. Við hesum er eisini sagt, at tað finnast nógvir sálmar á føroyskum, sum ikki eru komnir við í sálmabókina.

**Ymisk sløg av sálmum**

Sálmar kunnu vera ógvuliga ymiskir, og tað kann við hvørt vera sera torført at taka dagar ímillum, um talan er um ein sálm, eina bíbilska vísu ella ein sang. Í summum førum eru fólk ikki heilt samd um hetta. Nakrir sálmar eru lættir at flokka, sum t.d. ein jólasálmur ella ein páskasálmur, meðan aðrir eru ikki eins eyðsýndir.

**Sálmar og bíbilskar vísur**

Ein sálmur ber altíð ein boðskap ella sum orðabókin sigur: *Andalig yrking til gudstænastubrúk o.til.* Frá gamlari tíð hevur tað verið siður at syngja bæði sálmar og andaligar vísur í Føroyum, og við hvørt hava fólk havt torført við at skilja millum eina andaliga vísu og ein sálm. Bíbilska vísan er ein enduryrking av t.d. eini frásøgn í Bíbliuni, eini halgisøgu ella lærubókini. Skaldið kemur ikki við síni egnu tulking, her er talan um endurgeving upp á rím. Sálmurin fer eitt stig longur, og tulkingin kemur inn í myndina. Skaldið førir ein boðskap fram t.d. til uppbygging, troyst, ugga ella læru. Sálmurin lýsir kenslur og talar til kenslurnar hjá tí, ið syngur/lesur sálmin.

**Um sálmaskaldini**

Til tey eldru havi eg gjørt eitt sindur burtur úr nøkrum sálmaskaldum. Onkur vil kanska halda, at eg havi alt ov fáar føroyingar við, og tað kann eisini vera ein

sannleiki í tí, men til tað er at siga, at tað ógviliga torført er finna tilfar um føroysk sálmaskald sæð úr einum sálmaskaldsligum sjónarhorni, tí tey føroysku skaldini verða ikki viðgjørd sum sálmaskald, men heldur sum t.d. fosturlandsskald. Tó haldi eg, at tey skaldini, sum eg havi valt, hava skaldsligan og kirkjusøguligan týdning fyri fólkakirkjuna í Føroyum. Luther[8] er trúbótarmaðurin, Kingo[9] stendur fyri barokkskaldskapinum, Brorson[10] er pietistur, Grundtvig[11] er sín egin og móti rationalismuni. Jacob Dahl[12] er faðirin at tí føroyska kirkjumálinum, skald og hevur harafturat gjørt nógvar meistarligar týðingar av kjarnusálmum hjá teimum norðurlendsku kirkjunum. Mikkjal á Ryggi[13] yrkir um gerandis kristindómin, og hann hevur eisini týtt nógvar sálmar.

## Arbeiðshættir

### Floksundirvísing

Tað er natúrligt at byrjað verður við floksundirvísing, har næmingarnir læra at nýta greiningarfrymilin, tí nakrir spurningar í greiningarfrymlinum eru so mikið torførir, at næmingunum fer at tørva hjálp.

### Bólkaarbeiði

Her kunnu bólkarnir antin arbeiða við sama sálmi ella hvør við sínum sálmi. Arbeiða bólkarnir við sama sálmi, kann arbeiðið gerast meira fjøltáttað, um næmingarnir hava eitt orðaskifti í flokkinum um ávísar spurningar. Nakrar av uppgávunum leggja beinleiðis upp til felags samtalu í flokkinum. Verður bólkaarbeiðið nýtt, ber eisini til at seta tað saman við evnisarbeiði og tematiskum arbeiði við sálmunum, t.d. við at

---

[8] Pedersen, E. Thestrup: **Nattergalen fra Wittenberg, om Luthers salmedigtning**, Materialecentralen Religionpædagogisk Center, 1989
[9] Svendsen, Erik Norman: **Thomas Kingo Salmer og samtid**, Materialecentralen Religionpædagogisk Center, 1990
[10] Arndal, Steffen: **H. A. Brorsons liv og salmedigtning**, Materialecentralen Religionpædagogisk Center, 1994
[11] Baslev-Clausen, Peter: **Det vingede ord om N. F. S. Grundtvigs salmedigtning**, Materialecentralen Religionpædagogisk Center, 1991
[12] Hansen, Jákup Reinert: **Mellem kor og skib Jacobs Dahls færøske postiller**, Føroya Fróðskaparfelag, 2004
Matras, Chr.: **Nøkur Mentafólk**, Emil Thomsen, 1973
**Blaðgreinir** av ymiskum slag
[13] Petersen, Heini F. og Hansen, Jákup Reinert: **Mikkjalsbók**, Bókadeild Føroya Lærarafelags, 1994
Matras, Chr.: **Nøkur Mentafólk**, Emil Thomsen, 1973
**Blaðgreinir** av ymiskum slag

bólkarnir arbeiða við hátíðarsálmum, morgun- og kvøldsálmum ella við sálmum, sum viðgera ymisk evni í tilveruni ella í Bíbliuni.

**Drama**

Nakrir sálmar hóska sera væl at dramatisera. Her kann bæði vera talan um at dramatisera boðskapin ella kenslurnar (huglagið), sum sálmurin fær fram í einum, tá hann verður lisin/sungin. Eisini kann sálmurin verða nýttur sum hugskot, so at arbeitt verður víðari út frá honum. Dramatiseringin leggur upp til nógvar møguleikar við rørslum, ljóði og symbolum, sum vit finna í sálmunum.

**Evnisarbeiði - tematiskt arbeiði**

Tá ið arbeitt verður við sálmum, kunnu fleiri tilgongdir nýtast. Støðið kann t.d. takast í sálmasløgunum, lívsrytmu, hátíðum, Bíbliuni ella tilveruni sum heild.

**Myndamál og myndlist**

Nógvir sálmar hava eitt ríkt myndamál. Myndirnar eru til at gera tað ósjónliga sjónligt. Guð er jú ósjónligur, eins og menniskjans tankar og kenslur eru ósjónligar. Í hesum høpi kann t.d. verða arbeitt við myndamálinum í barokkum skaldskapi, pietistiskum skaldskapi, hjá Grundtvig og hjá Mikkjali á Ryggi. Sálmar eru eisini kveikjandi og kunnu nýtast sum hugskot til ymiskar myndir. Her kann bæði vera talan um at myndskrýða ein sálm ella at gera eina heilt nýggja mynd. Á hesum økinum eru møguleikarnir nógvir, og her kann bæði vera talan um einstaklingaarbeiði og bólkaarbeiði.

**Sálmasløgini**

Sálmarnir eru í stóran mun yrktir fyri at seta orð á ella lýsa kenslur og innarlig ynskir, sum knýta seg at trúarlívinum hjá skaldinum. Harafturat kemur so ein boðandi partur. Hyggja vit at grundkjarnanum í sálmunum, kann sigast, at sálmarnir í høvuðsheitunum fevna um evnini: lovsong, bøn og trúarjáttan. Ofta koma øll hesi fyribrigdi fyri í einum og sama sálmi.

Í sambandi við lovsong kann arbeiðast við nr 1, 19, 25 og 29 í Sálmabókini.

Er evnið bøn, kunnu nr. 67, 231, 389 og 470 verða nýttir.

Í sambandi við trúarjáttanina kunnu nr. 37, 174 og 225 nýtast.

**Lívsrytman** (lívsgongdin)

Nógvir sálmar viðgera lívsgongdina og rytmuna í tilveruni. Árið hevur sína gongd og dagurin sína. Mangan verður náttúran við síni gongd sammett við mannalívið úr vøggu í grøv. Árstíðirnar verða í summum førum knýttar at fyribrigdum í Guðs ríki.

Um ætlanin er at arbeiða við morgun- og kvøldsálmum, kunnu nr. 327, 545, 546, og 561 nýtast. Árstíðirnar og fyribrigdi í Guðs ríki verða m.a. lýst í nr. 197 og 229

**Hátíðir**

Í sambandi við tær kirkjuligu hátíðirnar ber væl til at arbeiða bæði við teimum bíbilsku tekstunum og sálmum, sum hoyra til. Sálmarnir kasta eisini stundum ljós yvir, hvussu kirkjan gjøgnum tíðirnar hevur fatað tær kirkjuligu hátíðirnar.

Atventin: nr. 82

Jólini: nr. 103, 105 og 123

Páskirnar, Jesu deyða, uppreisn og himmalsferð: nr. 174, 179, 195, 197, 198 og 216

Heilagi andin: nr. 229 og 231

**Bíbilskir sálmar**

Ymiskt er, hvaðan skaldini hava fingið íblástur til sína yrking, men tað er ein sannroynd, at Bíblian er ein týðandi kelda til íblástur. Nógvir sálmar eru yrktir beinleiðis yvir bíbliutekstir.

Av sálmum, sum liggja nær einum bíbliuteksti ella beinleiðis sipa til Bíbliuna kunnu nevnast nr. 1, 43, 48, 105, 174, 179, 195, 229, 318, 198, 470 og 503.

**Keldur:**

**Keldur til sálmarnar, sálmagreiningina og innihaldið**

Dahl, Árni, Steinbjørn B. Jacobsen, Ása Magnussen: **Ung orð.** Føroya Skúlabókagrunnur, 1984

Dahn, Helge: **Salmehåndbogen, en gennemgang af den danske salmebog**. Nyt Nordisk forlag Arnold Busck, 1984

Den Danske Folkekirke **www.folkekirken.dk**

Folkekirkens Skoletjeneste i Haderslev**: På salmernes tonestige**. http://home3.inet.tele.dk/agerbo/m.html

Føroya Stiftsstjórn **www.folkakirkjan.fo**

Madsen, Helle Krogh og John Rydahl: **Tegn og syng en salme**. Nyt Nordisk Forlag Arnold Busck, 2002

Malling, Andreas: **Dansk salme historie bind I-V**. J. H. Schultz Forlag, 1962-1966

Matras, Karolina: **Káin og Ábel – Næmingabók**. Føroya Skúlabógabrunnur, 2003

Jensen, Th. Borup / K. E. Bugge red.: **Salmen som lovsang og litteratur I og II**. Religionspædagogiske Studier /Gyldendal,1972

Rydahl, John o.a.: **Salmer i centrum**. Nyt Nordisk Forlag Arnold Busck, 1999

Rydahl, John o.a.: **Lærervejledning til Salmer i centrum**. Nyt Nordisk Forlag Arnold Busck, 1999

**Ymsar blaðgreinir,** mest úr Dimmalætting

**Keldur um sálmaskaldini**

Arndal, Steffen: **H. A. Brorsons liv og salmedigtning**. Materialecentralen Religionpædagogisk Center, 1994

Baslev-Clausen, Peter: **Det vingede ord om N .F .S. Grundtvigs salmedigtining**. Materialecentralen Religionpædagogisk Center, 1991

Hansen, Jákup Reinert: **Mellem kor og skib Jacobs Dahls færøske postiller**. Føroya Fróðskaparfelag, 2004

Matras, Chr.: **Nøkur mentafólk**. Emil Thomsen, 1973

Pedersen, E. Thestrup: **Nattergalen fra Wittenberg, om Luthers salmedigtning**. Materialecentralen Religionpædagogisk Center, 1989

Petersen, Heini F. og  Jákup Reinert Hansen: **Mikkjalsbók**. Bókadeild Føroya Lærarafelags, 1994

Svendsen, Erik Norman: **Thomas Kingo, Salmer og samtid**. Materialecentralen Religionpædagogisk Center, 1990

**Myndir:**
Matthiast Grünewald, Krossfestingin, uml. 1524
http://www.ibiblio.org/wm/paint/auth/grunewald/
http://www.abcgallery.com/G/grunewald/grunewald.html

Sámal Joensen Mikines:
Mynd I  Saknur: http://www.art.fo/en/faroese_artists/samuel_joensen_mikines.php
Mynd II  Føroyskur dansur: http://heima.olivant.fo/~mykines/artdans.htm

**Aðrar keldur**
Dahl, Árni: **Bókmentasøga 1-3**. Forlagið Fannir, 1980-82

**Ymsar blaðgreinir**, mest úr Dimmalætting

 *© Føroya Skúlabókagrunnur 2008*

Føroya Skúlabókagrunnur 2008